# Kvinnur ræðast fjølmiðlarnar

**- Tíðindaflutningurin hevur ikki tíð at bíða eftir kvinnum, sum skulu hava eina viku at hugsa seg um í. Tí detta teirra meiningar niður ímillum, meðan mannfólkini sleppa at fylla dagligu tíðindasendingarnar, segði Katrin Petersen, tíðindaleiðari í Sjónvarpi Føroya, á Kvinnuráðstevnuni á Hotel Hafnia leygardagin**

KVINNURÁÐSTEVNA.
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Eini 90 kvinnur vóru komnar saman á Kvinnuráðstevnuni, sum Urd skipaði fyri leygardagin. 12 kvinnur lýstu 6 ymisk evni út frá einum søguligum og einum nútíðar sjónarhorni fyri at meta um, "Hvussu langt eru vit komnar í 30 ár", sum eisini var heitið á tiltakinum. Evnini vóru áhugaverd og viðkomandi, men tað var serliga evnið "Fjølmiðlar" ella "Kvinnur í fjølmiðlunum", sum fekk ferð á kjakið.

**"Góða spyr onkran annan?"**

At vit síggja nógv færri kvinnur tíðindatilfarinumí fjølmiðlunum enn menn, man neyvan nakar vera í iva um. Spurningurin er so, um tað er tí, tær ikki verða spurdar, ella tí tær bera seg undan, tá tær verða spurdar.

Randi Jacobsen, sum dagliga starvast á Dimmalætting, visti at siga, at tá tað ræður um at fáa kvinnur at úttala seg til bløðini, er lítið broytt tey 26 árini, hon hevur virkað sum blaðkvinna.

- Tað eru sjálvandi undantøk, men sum heild ført tú sum blaðkvinna nógv meir stríð av at seta teg í samband við eina kvinnu enn við eitt mannfólk, tá tú skalt brúka eina keldu til eina grein, segði Randi. "Góða spyr onkran annan. Kanst tú ikki ringja aftur seinni, eg má at hugsa meg um.", er vanliga svarið, tú ført. Oftast vilja tær eisini síggja greinina, áðrenn hon fer í blaðið, og tað kemur ikki so sjáldan fyri, at tær gremja seg um hana aftaná og tá hava meiningar um, hvussu greinin heldur átti at verið skrivað.

- Hetta kann brúkast som ein forklaring uppá skeivu umboðanina av kvinnum í fjølmiðlunum, men tað eigur ikki at gerast ein undanførsla fyri ikki at brúka kvinnur sum keldur í tíðindaflutninginum, segði Randi. Vit kundu ivaleyst gjørt okkum meir ómak við at komið á tal við fleiri kvinnur. Trupulleikin er bara, at vit tíðindafólk allatíðina arbeiða fram ímóti einum evstamarki, har vit hava brúk fyri viðmerkingunum, skjótast til ber. Tí hava vit eisini brúk fyri at vita, hvaðani vit skjótast fáa viðmerkingarnar og sum er, er tað also frá mannfólkunum.

**Tær vilja ikki, tá eg vil**

Katrin Petersen, tíðindaleiðari í Sjónvarp Føroya, var samd við Randi í, at tíðindaflutningurin ikki hevur tíð at bíða eftir konufólkunum.

- At kvinnur eru so lítið at síggja í tíðindunum kemst ikki av, at tær ikki duga at greiða frá. Tað duga tær væl, men tað skal helst vera um okkurt, tær sjálvar hava upplivað. Tí síggja og hoyra vit tær oftast sum tað, vit kalla "erfaringsvitnir og offur" í ofta sera áhugaverdum sendingum sum til dømis Tilvera, har tær greiða frá, hvussu tað er at missa eitt barn, at fáa eitt brekað barn, at blíva skild, at vera tunglynt o.s.fr. Nógv bendir eisini á, at kvinnur hava lættari við at traðka fram í slíkum sendingingum, enn mannfólk, segði Katrin.



*- Tað er ikki minst kvinnurørsluni fyri at takka, at mannfólk ikki longur gera mun á, um tað er ein blaðmaður ella ein blaðkvinna, sum setur teimum spurningr um typisk mannfólkamál, segði Randi Jacobsen, blaðkvinna*



*- Skalt tú sleppa framat í fjølmiðlunum, mást tú tora at standa einsamøll við ábyrgdini fyri tí, tú hevur sagt, segði Katrin Petersen millum annað á Kvinnuráðstevnuni leygardagin*



*Eini 90 kvinnur vóru komnar saman á Kvinnuráðstevnuni leygardag*

- Alt gott um slíkar sendingar, men á tíðindadeildini hjá Sjónvarpi Føroya havi eg brúk fyri kvinnum við eini meining ella einum boðskapi. Hesar finnast eisini - trupulleikin er bara, at tær vilja ikki, tá eg vil, segði Katrin. Tær bera seg undan og duga sum heild illa at lata tað verða upp til journalistin at gera av, hvør er tann rætta at tosa við nær, og hvat mál hevur nóg nógv uppá seg.

- Í politikki tosa vit ofta um at broyta karmarnar soleiðis, at teir hóska kvinnum betri. Men í tíðindaflutningi ber tað snøgt sagt ikki til at laga seg eftir eini kvinnu, sum skal hava eina viku at hugsa seg um í. Tað skal vera her og nú, og kann tað ikki tað, verður tað av ongum. Úrslitið er tíverri, at tær meiningar ella boðskapir kvinnur møguliga hava, ofta detta niðurímillum, segði Katrin.

**Almennur trupulleiki**

Eitt er, at uppteljingar vísa, at mannfólk spæla høvuðsleiklutin í 80 % av innsløgunum í tíðindasendingunum. Men hyggja vit at lesarabrøvunum og tí innsenda tilfarinum í bløðunum, sær myndin lítið fræguri út.

- Tá einasti føroyski, kvinnuligi floksformaðurin valdi at leggja frá sær, var bert eitt lesarabræv skrivað av eini kvinnu at síggja í bløðunum, og tað kom frá eini tjóðveldiskvinnu. Hvar vóru sambandskvinnurnar, tá teirra floksformaður legði frá sær? Hvar vóru kvinnurnar sum heild, tá henda týdningarmikla hendingin fór fram?, spurdi Katrin Petersen, sum í heila tiki eftirlýsti kvinnur, sum vilja og tora at siga sína meining um samfelagslig viðurskifti alment.

- Okkurt bendir á, at kvinnur fata fjølmiðlarnar sum eina hóttan, meðan mannfólkini síggja teir sum ein frálíkan møguleika at sleppa framat við síni hugsan. Men skalt tú sleppa framat í fjølmiðlunum, mást tú eisini tora at at standa einsamøll við ábyrgdini fyri tí, tú hevur sagt og ikki vera bagin fyri at fáa eina skolu niðuryvir teg dagin eftir. Alt ov ofta halda kvinnur fram við at bera seg at, sum tær gjørdu í skúlastovuni, har tað var heilt avgerandi, at man var samdur við hinar og kundi siga, "Vit halda", so ongin kundi koma afturumaftur og geva nakrari ávísari skyldina, segði Katrin.

Hinvegin helt hon tað vera meir álvarsamt at fáa sum grundgeving frá kvinnum, at tær ikki vildu úttala seg um serliga kvinnumál, tí tað kundi skaða teirra leiklutir aðrastaðni í samfelagnum. Hetta átti at givið okkum øllum okkurt at hugsa um, helt Katrin Petersen.

**Hinumegin leiktjøldini**

Hóast kvinnuliga umboðanin í fjølmiðlunum úteftir stórt sær er óbroytt seinastu 30 árini, eru glottar at hóma hinumegin fjølmiðlaleiktjøldini. Randi Jacobsen var sannførd um, at tað ikki minst er kvinnurørsluni fyri at takka, at mannfólk ikki longur gera mun á, um tað er ein blaðkvinna ella ein blaðmaður, sum setur teimum spurningar um okkurt typiskt mannfólkaevni. Hon vísti eisini á, at sjálvt um føroyskir kvinnuligir journalistar ikki hava nakað skipað samstarv, sum tær til dømis hava í Danmark, so duga tær væl at brúka hvørja aðra í dagliga tíðaarbeiðinum.

Bjørt Samuelsen, tíðindakvinna, skeyt upp, at kvinnur seta seg í samband við fjømiðlarnar fyri at vera við til at dagføra telefonlistarnar hjá teimum, so at fleiri nøvn á kvinnum eru at velja ímillum.

- Sum er, er tað ofta bert ein óvani, at vit ikki oftari seta okkum í samband við kvinnur. Stóðu teirra nøvn ovast á listunum, hevði tað verið ein rættiliga ítøkilig áminning um, at her er ein óvani, sum kann broytast, segði Bjørt Samuelsen millum annað, tá tikið varð samanum á Kvinnuráðstevnuni leygardagin.



*Hesar løgdu fram á Kvinnuráðstevnuni leygardagin:*
*Aftast: Randi Jacobsen, Bergtóra Hanusardóttir, Barbara á Tjaldrafløtti, Súsanna Danielsen, Marita Rasmussen, Karin Kjølbro, Annika W. Joensen, Malan Marnersdóttir, Katrin Petersen, Anna Maria Fossá og Petra Jónsdóttir Joensen, fyriskipari.*
*Fremst: Ingvør Nolsø, Anita á Fríðriksmørk og Bjørt Samuelsen, orðstýrari*



Føroyingar aftur av ferð í Moskva:

# Misjavnar meiningar um Fish 2004

**- Føroysku framsýnararnir á fiskivinnumessuni í Moskva, Fish 2004, vistu frammanundan, at hetta var ein lutfalsliga lítil framsýning. Men eftir hvat eg havi skilt, høvdu tey, sum fóru yvir at hyggja at messuni, væntað meira, enn tey sóu. Tí eru summi vónbrotin, sigur Kjartan Kristiansen á Menningarstovuni**

FISH 2004
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í vikuskiftinum komu føroyingar aftur av fiskivinnuframsýningini, Fish 2004, sum í síðstu viku varð hildin í Moskva. Tað var Flogfelag Føroya, ið skipaði fyri flutninginum, og tað var flogfarið hjá Atlantsflogi, sum fleyg til Moskva og heimaftur við føroysku luttakarunum. Farið varð yvir týsdagin, sum stevnan læt upp mikudagin. Fish 2004 læt aftur leygardagin.

Føroysku fyritøkurnar, sum vóru við á stevnuni, vóru Faroe Ship, Farpack, Bergfrost, PM Group (Poul Michelsen), Tórshavnar Skipasmiðja, North Atlantic Fish Fair, Vónin, Landshandilin, Poul Hansen, PRG (Fiskavirkið í Gøtu), Vestpack, Farex, Faroe Seafood, Tórshavnar havn, Fuglafjarðar havn og Tvøroyrar havn.

**Felags básur**

Nú føroysku luttakararnir eru komnir aftur, hevur ljóðað, at Fish 2004 hevur verið eitt vónbrot, tí stevnan var ikki tað, sum roknað varð við.

Á framsýningini luttóku føroysku framsýnararnir á einum felags bási – ella undir einum hatti, sum tikið verður til, og tað var Menningarstovan, sum enn einaferð skipaði fyri føroysku luttøkuni.

Kjartan Kristiansen, stjóri, sigur seg eisini hava skilt, at onkur av føroysku hyggjarunum á Fish 2004 var vónbrotin.

- Men eg haldi ikki, at tey, ið umboðaðu føroysku fyritøkurnar, sum bjóðaðu seg fram á stevnuni, vóru vónbrotin. Eg havi í hvussu er skilt, at summir hava væl kom burtur úr. Endamálið hjá okkum var eitt nú at koma í samband við tey reiðaríir, sum eiga skipini, ið liggja her í Nólsoyarfirði. Ætlanin við luttøkuni var eitt nú at bjóða viðskiftafólki, reiðaríum og fyritøkum annars í Russlandi at vitja føroysku fyritøkurnar.

Kjartan vísir á, at Menningarstovan frammanundan hevði greitt føroysku framsýnarum frá, at Fish 2004 er ein lutfalsliga lítil framsýning.

- Nú veit eg ikki, hvat onnur, ið vóru við í Moskva sum hyggjarar, høvdu ímyndað sær, áðrenn tey fóru avstað, men framsýnararnir vistu í hvussu er, hvat tey fóru yvir til.

**Onnur framsýning**

Hann sigur, at nakrar dagar, áðrenn Fish 2004 varð sett í Moskva, var ein onnur framsýning har yviri. Hetta var ein framsýning við matvørur úr havinum.

- Vit vóru nógv í iva um, hvørt vit skuldu vera við á hesi stevnuni ella ikki. Ein orsøk til, at vit avgjørdu ikki at verða við, er, at vit hava ongan handilssáttmála við Rusland. Haraftrat høvdu lutfalsliga fáar fyritøkur boðað frá luttøku á matvørustevnuni. Fish 2004, sum føroysku fyritøkurnar vóru við á, var eitt nú stuðlað av russisku stjórnini, og tað talaði eisini fyri hesi luttøku.

Kjartan vísir á, at hóast marknaðarbúskapurin vinnur alt meira fram í Russlandi, so tekur tað tíð, áðrenn landið er við á øllum økjum.

- Eingin eigur at ímynda sær, at nøkur framsýning í Russlandi, sum fevnir um vinnuna, er stór, tí enn eru marknaðarkreftirnar ikki rættiliga farnar at virka. Í Russlandi eru nakrar stórar fyritøkur, sum áður vóru kommunistiskar, men sum nú eru tað, sum vit rópa, privatiseraðar. Men vitksemið, sum vit hava aðrastaðni við at hava stórar framsýningar, er ikki rættiliga komið í gongd eystan fyri enn.

Trý fólk, sum starvast hjá Menningarstovuni, vóru við í Moskva, og haraftrat vóru tríggir tulkar við, sum duga russiskt. Hesir vóru føroysku fyritøkunum, sum luttóku á messuni, til hjálpar.

**Møttu ikki**

- Tann eina stevnudagin, nevniliga hósdagin, høvdu vit væntað vitjan av reiðaríum, sum vit høvdu gjørt avtalur við, men tá ið samanum kom, møttu hesi ikki upp. Kjartan heldur tískil ikki, at russar eru betur til at halda avtalur enn eitt nú føroyingar.

- Sjálvandi var tað harmiligt, at reiðaríini ikki møttu soleiðis, sum vit høvdu avtalað, men hetta er ein partur av tí heila. Hinvegin mugu vit hugsa um, at teinurin er eitt nú Murmansk og Arkangelsk, har reiðaríini eru, sum vit hava áhuga í, er rættiliga stórur. Sum dømi kann nevnast, at Arkangelsk er líka stórt sum Frakland. So, vit tosa her um heilt aðrar "distansir" enn teir, vit kenna í Føroyum og um okkara leiðir.

Stjórin á Menningarstovuni heldur annars, at føroysku framsýnararnir sum heild vóru nøgdir við luttøkuna, og hann veit eisini, at tað vóru feløg, ið eitt nú fáast við sølu av fiski, sum fingu í lag góð sambond í Russlandi.

**At vera við**

- Skulu vit skapa okkum nýggjar møguleikar og avtalur, mugu vit vera við, har nakað kann vera at heinta. Vit røkka ikki øllum, men vit avgjørdu so at verða við á Fish 2004 í Moskva, hóast hendan framsýningin ikki er so stór sum aðrar, vit kenna, sigur Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni.





*Føroyingar avgjørdu at verða við á Fish 2004 í Moskva í staðin fyri at verða við á eini aðrari framsýning um matvørur úr havinum, sum var í býnum stutt frammanundan*



*Fiskivinnuframsýningarnar í Ruslandi kunnu ikki sammetast við tær stóru framsýningarnar, vit kenna her um okkara leiðir*



*- Eg haldi ikki, at tey, ið umboðaðu føroysku fyritøkurnar, sum bjóðaðu seg fram á stevnuni í Moskva, vóru vónbrotin, tí tey vistu, hvat tey fóru til, sigur stjórin á Menningarstovuni, Kjartan Kristiansen*